60 ára føðingdardagur:

# Fekk ein kjans afturat

Árni í Stórustovu hátíðarheldur í kvøld sín 60 ára føðingardag í Snapsatinginum á Christiansborg. Árni starvast sum parkeringsvørður í Fólkatinginum, og hóast 60 ára gamal, so hevur hann ongar ætlanir um at fara av arbeiðsplássinum, hann er so góður við, og sum var honum so hollur stuðul, tá hann var fyri herviligari ferðsluvanlukku fyri tveimum árum síðani




*Í 21 ár hevur Árni starvast á Christiansborg, og hann ætlar at halda fram í starvinum sum parkeringsvørður so leingi hann kann. Tað er ikki endiliga lønin, sum dregur, men góðu starvsfelgarnir og arbeiðsviðurskiftini*

*Magnus Dam, Christiansborg*

Fløggini veittraðu við stóru trappuna uttanfyri Christiansborg mánadagin. Eitt av mongu starvsfólkunum í húsinum hevði rundan føðingardag. Havnarmaðurin Árni í Stórustovu, sum saman við konuni Joslu hevur búð í Danmark síðani 1974, kundi henda dag halda sín 60 ára føðingardag.

Vit hitta parkeringsvørðin uttanfyri Christiansborg, har hann hevur sína dagligu gongd á parkeringsplássinum. Árni hevur einsamallur parkeringina undir sær, og hevur eyguni eftir, at teir 179 fólkatingslimirnir og hini starvsfólkini halda reglurnar. Og at fólk uttanífrá ikki parkera á økinum hjá Fólkatinginum, tá tey ikki finna eitt parkeringspláss aðrastaðni í stórbýnum.

- Eg gevi ikki bøtur, um fólk parkera, har tey ikki skulu. Tað kann eg ikki, tí hetta er ikki alment øki. Eg gevi politinum eitt praj, um onkur hevur tiltuskað sær eitt parkeringspláss, og politiið gevur so eina bót. Men fólk skikka sær væl fyri tað mesta, greiðir Árni frá, meðan vit ganga á parkeringsøkinum.

### 21 ár sama stað

Árni í Stórustovu hevur arbeitt á Christiansborg síðani 1981. Fyrst pussaði hann vindeygu og røkti starvið sum parkeringsvørður, men seinastu árini hevur hann verið parkeringsvørður burturav.

Hann er glaður fyri arbeiðsplássið hjá sær og hevur ongan hug at fara, hóast hann nú hevur rokkið eftirlønaraldur.

- Eg ætli mær at steðga her so leingi, eg kann. Her er gott at vera, og her kenni eg meg vælkomnan, sigur Árni. Tað er eisini týðiligt, at her ikki er talan um ein parkeringsvørð, sum liggur og lúrir eftir at fanga ferðslusyndarar og sær eina fragd í tí. Árni er fryntligur og dámligur, og hann er eitt kent andlit inni á Christiansborg. Starvsfólk, fólkatingslimir og fyrrverandi ráðharrar — øll heilsa upp á Árna. Ein tíðindamaður steðgar honum eisini, meðan vit ganga eftir gongini, og kærir sína neyð um eitt útgingið parkeringsloyvi.

- Tað finna vit útav. Parkera tú bara fyribils inni í garðinum, sissar Árni. Tað er eingin orsøk at vera óreinur, hóast parkeringsplássini eru fá, sigur hann, meðan vit spáka víðari. Yvir til eina av matstovunum at fáa okkum ein kaffimunn.

### Niðursetta tíð

Seinastu tvey árini hevur Árni ikki arbeitt fulla tíð. Ikki síðani vanlukkuna fyri tveimum árum síðani, sum av álvara fekk hann at stúra fyri, um hann nakrantíð aftur fór at seta síni bein inni á Christiansborg.

Vanlukkan hendi 19. januar í 2000. Eftir loknan arbeiðsdag setti Árni seg í sín Peugeot 106, og hann var næstan komin teir 100 kilometrarnar suður til Svebølle, har hann býr, tá vanlukkan hendi.

- Tað er løgið, so knappliga tað kann henda. Eg hevði hálvannan kilometur eftir at koyra, so var eg heima, sigur Árni. Men hann kom ikki heim hendan dagin. Í einum vegkrossi stendur ein lastbilur og bíðar eftir at snara til vinstru inn á ein síðuveg. Árni kemur koyrandi í hinari vegbreytini og skal beint fram, tá ið ein annar lastbilur, hóast vánaligt sýni, knappliga yvirhálar lastbilin, ið stendur og bíðar. Har var einki at gera, lastbilurin stoytti frontalt saman við Peugeot-bilin hjá Árna.

Árni fer í innara lumman og tekur ein brævbjálva fram. Á brævbjálvanum, sum er eitt sindur slitin, er ein tekning, ið vísir, hvussu óhappið hendi. Árni greiðir frá og letur síðani brævbjálvan upp og tekur nakrar myndir uppúr. Á myndunum sæst, hvussu illa bilurin er farin. Øll gronin er púrasta knúst, og eg noyðist at spyrja, hvat merkið bilurin er, tí tað sæst ikki annað enn blái liturin á samankroysta bilinum.

### Fekk fleiri blíðproppar

Samanstoyturin var so harður, at instrumentbrettið kroystist niður yvir beinini á Árna, so hann kom at sita fastur í bilinum. Beinini fóru illa, og hann fekk fleiri blóðproppar í beinini, tí trýstið á tey var so stórt.

- Eg stúrdi fyri tí ringasta. At eg fór at gerast lamin og ongantíð koma á føtur aftur. Tað hevði verið ræðuligt. Læknin, sum kom á staðið, bar eisini ótta fyri tí sama, men ein uggi var tað, at eg kundi flyta tærnar.

Árni sat fastur í ein tíma, áðrenn tað eydnaðist at skera hann leysan. Fyri framman lógu nú tríggjar vikur á sjúkrahúsinum og eitt nógv longri tíðarskeið, sum skuldi brúkast til at venja beinini uppaftur.

- Læknin segði, at tað var einki minni enn eitt undur, at eg kom so væl frá vanlukkuni, og tað sama hava onnur sagt, sum hava sæð bilin og hava skil fyri tí.

Tað er tí ikki løgið, at Árni kennir tað, sum hevur hann fingið ein kjans afturat. Í dag haltar hann eitt lítið sindur, men annars eru ongi sjónlig tekin um vanlukkuna.

- Viðhvørt vakni eg um næturnar eftir at hava droymt um vanlukkuna og sæð hana fyri mær aftur. Tað er einki serligt. Ikki tí, eg eri komin yvir vanlukkuna og havi lagt hana afturum meg. Tað er heldur ikki tí, eg gangi við brævbjálvanum í innara lummanum. Tað er bara léttari at greiða frá vanlukkuni, tá eg havi myndirnar og tekningina, sigur hann og undirstrikar beint aftaná, at hann ikki tekur brævbjálvan fram í tíð og ótíð.

### Góðir stuðlar

Væl stuðlaður av konu, børnum og starvsfeløgum kom Árni á beinini aftur. Børnini tóku sær av øllum tí praktiska við trygging og øðrum, og frá Fólkatinginum fekk hann at vita, at starvið fór ongan veg, og hann var altíð vælkomin aftur. Sjálvur skuldi hann bara syrgja fyri at koma fyri seg aftur.

- Tað hevur hjálpt væl at vita, at arbeiðsplássið og starvsfelagar stuðla einum so væl, sum tey hava gjørt her inni, sigur Árni, sum gleðiliga koyrir teir 100 kilometrarnar til arbeiðis, hóast tað tekur honum meira enn tveir tímar, tí beinini skulu hava hvíld viðhvørt.

- Tað kennist, sum er tað so stutt síðani, eg byrjaði um aftur, um tað ber til at siga so. Tú hyggur eitt sindur øðrvísi at lívinum eftir eina sovorðna vanlukku og setur størri prís uppá nógv ting. So eg havi ongan hug at gevast at arbeiða enn, sigur Árni.

Hóast hann hevur frí leygardag, so gongur leiðin aftur í dag frá Svebølle til Christiansborg. Í dag hevur hann konuna Joslu við, og saman við børnunum Ann og Kaj og familju, vinum og kenningum í Danmark og úr Føroyum verður 60-ára føðingardagurin hildin í matstovuni á Christiansborg, Snapsatinginum.





*Nývaldi formaðurin í felagnum "Vinir Ísraels í Føroyum" Dánjal Poulsen og fráfarni formaðurin Eliasar Arge*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vinir Ísraels í Føroyum

Felagið "Vinir Ísraels í Føroyum" hevur til endamáls at stuðla Ísrael. Formaður felagsins, Dánjal Poulsen, harmast um, at Ísrael verður lýst sum eitt hersetingarvald í fjølmiðlum. Felagið roynir eisini at virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar

ÍSRAEL

*Stefan í Skorini*

Ísrael hevur nógvar vinir í Føroyum. Felagið "Vinir Ísraels í Føroyum" er eitt virkið felag, sum stuðlar unga landinum í Miðeystri.

– Hóast vit stuðla Ísrael, leggja vit dent á, at vit ikki á nakran hátt eru fíggindasinnað mótvegis øðrum londum og fólkasløgum, sigur Dánjal Poulsen, sum er nývaldur formaður fyri Eliesar Arge, ið var formaður frammanundan.

Formaðurin ásannar, at tað er torført at halda hesa meginreglu, tí stríðið millum palestinar og ísraelsmenn er somikið hart, men hann skoytir uppí, at Gud hevur eina størri ætlan við Ísrael, og henni mugu øll boyggja seg fyri.

Felagið hevur seks ár á baki og varð sett á stovn í 1996. Felagið gevur blaðið "Vinur Ísraels" út fýra ferðir um árið.

### Villleiðandi upplýsingar

Eitt av endamálum felagsins er at virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar. Orsøkin til tað er, at fjølmiðlarnir mangan lýsa Ísrael sum eitt hersetingarvald, hóast jødarnir hava rætt til landið.

– Tíverri er tað so, at fjølmiðlarnir mangan bera villleiðandi upplýsingar um stríðið millum Ísrael og palestinar. Heimspressan lýsir mangan Ísrael sum eitt hersetingarvald, men vit meta ikki, at hetta er rætt, sigur Dánjal Poulsen.

Hann vísir í hesum sambandi á, at Ísrael tríggjar ferðir er álopið av grannalondunum í 1948, 1967 og 1973. Tað var tá ikki Ísrael, ið gjørdi hernaðarligt álop á grannar sínar. Tí er tað skeivt at kalla Ísrael hersetingarvald, heldur formaðurin í felagnum.

– Eg havi mangan sæð BBC borið villleiðandi tíðindi í sjónvarpinum, tí undir kríggi og stríði verður ofta farið lætt um sannleikan, sigur Dánjal.

Hann leggur afturat, at felagið ikki leggur seg útí smálutirnar í ósemjuni við palestinar, og at tað helst sá, at arabar og ísraelsmenn liva saman í friði í Ísrael. Formaðurin heldur, at tað hevur hóast alt verið hampuliga friðarligt innanlands í Ísrael síðan 1948, og arabar hava tað sera gott í Ísrael.

Tað er torført at gera vart við skeivan tíðindaflutning, tá vit fáa tíðindini úr útlondum, men Dánjal Poulsen sigur, at limir felagsins hvør í sínum lagi skriva lesarabrøv og annað, og soleiðis virkar felagið fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar.

### Sharon er kroystur

Varandi ófriður hevur verið millum palestinar og ísraelska herin, og ógvusligir samanbrestir hava verið dagligur kostur í nærum hálvtannað ár.

Felagið "Vinir Ísraels í Føroyum" stuðlar tí stjórn, sum situr við valdið í Ísrael, tí hetta er einasta demokratiskt valda stjórnin í øllum Miðeystri, vísir formaðurin á.

Hann heldur, at forsætisráðharrin Ariel Sharon er hart kroystur av sjálvmorðsbumbunum frá palestinum.

– Ísraelar gera eisini mistøk í stríðnum, og tað er ógvuliga harmiligt, at sakleys fólk mugu líða, men hetta vísir seg ofta, tá ófriður brestur á.

– Men Sharon er noyddur at svara aftur, tí annars góðtekur hann sjálvmorðsatsóknirnar hjá palestinum, og hann er tí hart kroystur í hesum døgum, sigur Dánjal Poulsen.

Ógvusligu samanbrestirnir byrjaðu, eftir at Ariel Sharon hevði verið á vitjan á tempulplássinum í Jerusalem. Formaðurin vísir í hesum sambandi á, at hann hevði rætt at vitja tempulplássið, tí Ísrael altíð hevur kravt, at hetta plássið skal vera opið fyri almenninginum. Tíverri varð hetta uppfatað sum ein provokatión.

### Ítøkiligur stuðul

Felagið stuðlar á ymiskan hátt tiltøkum og felagsskapum í Ísrael. Felagið hevur í fleiri ár latið pening til eina verkætlan, sum hevur til endamáls at planta trø í Ísrael, tí ein stórur partur av landinum er oyðimørk. Felagið roynir á ymsan hátt at savna pening til hetta endamálið.

Henda verkætlan hevur fleiri ár á baki, tí longu í sekstiárunum fóru tey at planta trø í oyðimørkini. Eisini verður peningur latin til arbeiðið við at byggja vatnveitingar úti í oyðimørkini.

Ein hjálparfelagsskapur í Ísrael fær eisini ágóðan av arbeiðinum hjá felagnum. Hetta er felagsskapurin hjá Idu Nudel, sum hjálpir russiskum jødum, sum eru fluttir til Ísrael í stórum tali seinastu árini. Soleiðis fáa ísraelar ítøkiligan stuðul úr Føroyum.

Felagið arbeiðir eisini fyri samstarvi og sambandi við Ísrael. Í fjør var ísraelski sendiharrin í Danmark, sum eitur Yitzhak Eldan, á vitjan í Føroyum. Á vitjanini hitti hann Anfinn Kallsberg, løgmann, og landsstýrismannin Bjarna Djurholm, og hesir báðir samdust um at arbeiða víðari við eini ætlan innan samskifti.

Í september í fjør tók Carmi Gillon við sum sendimaður fyri Eldan. Gillon varð av politikarnum Søren Søndergaard úr SF meldaður til løgregluna, tí hann hevði sagt seg taka undir við at leggja lættari kropsligt trýst á fangar undir avhoyringum. Løgreglan gjørdi tó einki við hetta málið. Framsøgumaðurin hjá danska Javnaðarflokkinum í uttanríkismálum skeyt eisini upp at boykotta Carmi Gillon.

Hann er nú sendiharri Ísraels í Danmark, og felagið "Vinir Ísraels í Føroyum" hevur havt samband við nýggja sendiharran. Hann hevur sýnt áhuga fyri at koma til Føroya á vitjan, men enn er eingin almenn innbjóðing send honum.

Dánjal Poulsen heldur ikki, at so stórt rok fer at taka seg upp í Føroyum, sum tað gjørdi í Danmark. Hann vónar, at Carmi Gillon fer at koma á vitjan í Føroyum.

## Støði og endamál felagsins

Støði felagsins:

1. Felagið byggir á kristiligt grundarlag við áherðslu á bókstaviliga tulking av skriftini.
2. Felagið skal vera politiskt óheft og óheft av øllum trúarbólkum

Endamál felagsins:

1. At upplýsa um bíbilska grundarlagið undir tilveru Ísraels sum land og tjóð.
2. At virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar.
3. At eggja til bøn fyri Jerusalem, Ísrael og jødunum.
4. At virka fyri góðum samstarvi millum Føroyar og Ísrael á øllum økjum og at virka fyri góðum grannalagi millum londini í Miðeystri.
5. At mótvirka antisemitismu.